## Benitez sær møguleikan

Venjarin hjá Liverpool vil geva upp í stríðnum um enska meistaraheitið, hóast hansara lið nú er 7 stig aftanfyri Manchester United. Liverpool fekk bert javnleik burtur úr dystinum ímóti Manchester City í gjár. - Vit taptu tvey stig, men vit kunnu framhaldandi vinna okkara dystir, og vit hava ein dyst eftir ímóti Manchester United, sigur Rafael Benitez við Sky Sports.




## Solskjær vildi ikki

Tá ið Aage Hareide í fjør gavst sum norskur landsliðsvenjari í fótbólti, fekk Ole-Gunnar Solskjær tilboðið at gerast nýggjur venjari, men hann vildi ikki taka av. Tað sigur Solskjær sjálvur við norska TV2. - Eg helt ikki, at tað var rætta tíðin hjá mær at taka við starvinum. Tað var deiligt at verða spurdur, men tað kom ikki upp á tal, sigur Solskjær, sum er venjari á eykaliðnum hjá Manchester United.

# Fíggjarlig trongstøða kostar feløgum stig

**Í framtíðini kostar tað á stigatalvuni, um fótbóltsfeløg koma í fíggjarliga trongstøðu. Aðalfundurin hjá Fótbóltssambandinum samtykti eina nýggja grein 14, sum tekur hædd fyri revsingini, um feløg enda í skiftirættinum við sínum fíggjarviðurskiftum**

FSF-AÐALFUNDUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fleiri smærri broytingar vóru samtyktar í kappingarreglunum fyri fótbólt, men mitt í rúgvuni var ein rættiliga stór og umfatandi broyting, tí ein spildurnýggj grein 14 var sett inn í kappingarreglurnar. Hetta var ein sjónlig avleiðing av fíggjarkreppuni og tí fíggjarligu trongstøðu, fleiri føroysk feløg eru ella hava verið í.

– Vit hava í síðstuni sæð, at tað fíggjarliga gongur illa, og eisini hava onkur føroysk feløg verið so mikið illa fyri, at tey næstan eru endað í einari støðu, har skiftirætturin er komin inn í myndina. Tí máttu vit nú fáa eina nýggja grein inn í kappingarreglurnar, sum tók hædd fyri hesum, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti.



*– Vit máttu fáa reglur nú, sum taka hædd fyri, at føroysk fótbóltsfeløg kunnu koma í so álvarsliga fíggjarlig trongstøðu, at tey enda í skiftirættinum, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Henda nýggja grein 14 snýr seg um limafeløg hjá FSF ella aðrar løgfrøðiligar eindir, sum reka virksemið fyri viðkomandi feløg. Í hesum seinna førinum meinast við eitt nú partafeløg ella smápartafeløg, sum taka sær av eitt nú formulaliðum hjá feløgum.

Í grein 14 verður í høvuðsheitum staðfest, at boðar eitt felag skiftirættinum frá gjaldssteðgi ella letur honum áheitan um trotabúgvaviðgerð sambært konkurslógina, missir fremsta manslið felagsins trý stig. Og staðfestir skiftirætturin eina tvangsakkord fyri eitt felag, er stigamissurin seks stig. Hendir hetta millum tvey kappingarár, byrjar liðið næstu kapping við ávikavist trimum og seks stigum í minus.

Verður støðan hjá einum felag so álvarslig, at skiftirætturin tekur avgerð um trotabúgvaviðgerð, kann fremsta manslíðið verða flutt tvær deildir niður og í ringasta føri koyrt úr kappingini.

## Niklas vann á Pól við einari atkvøðu



*Niklas á Líðarenda og Pól Thorsteinsson heilsast eftir stríðsvalið um næstformanssessin, har Niklas fekk níggju og Pól átta atkvøður*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**Bert ein atkvøða var á muni, tá liðugt var at telja upp atkvøðurnar leygardagin, og tískil megnaði Niklas á Líðarenda akkurát at halda stand ímóti avbjóðaranum, Pól Thorsteinsson**

FSF-AÐALFUNDUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað var akkurát líka spennandi, sum tað hevur verið tey undanfarnu árini, tá stríðsval hevur verið á FSF-aðalfundi tey seinnu árini. Hesa ferð var tað Pól Thorsteinsson úr Vági, sum bjóðaði seg fram ímóti sitandi næstformanninum, Niklas á Líðarenda.

Christian Andreasen, fundarstjóri, læt siðvenjuna galda, at atkvøðast skuldi skrivliga, og tí gjørdist tað enn eina ferð ein spennandi løta, tá grannskoðarin, Jógvan Joensen, kom fram at rópa nøvnini upp, sum formenninir høvdu sett á atkvøðuseðlarnar – ein fyri ein.

Beinanvegin fekst ein ábending um, at hetta kundi gerast spennandi, tí Pól legði seg beinanvegin á odda, men so líðandi nærkaðist Niklas. Og tá avtornaði, var bara tann eina atkvøðan á muni, tí Niklas fekk níggju og Pól átta atkvøður.

### Verdigur avbjóðari

– Eg hevði onga peiling av, hvønn veg úrslitið fór, men tað gjørdist, sum tað so ofta hevur verið seinnu árini, at tað var sera javnt, sigur Niklas á Líðarenda, sum vónar, at tað vóru avrikini, ið komu honum til góðar í valinum.

Hóast Pól Thorsteinsson gjørdist ov stuttur, nú hann fyri fyrstu ferð stillaði upp til eitt val í FSF, heldur Niklas á Líðarenda ikki, at mótstøðumaðurin hesa ferð skal geva upp fyri tað:

– Pól var ein verdigur avbjóðari, sum kundi verið Fótbóltssambandinum til gleði og gagn, var hann valdur. Og vónandi heldur hann seg framat eina aðru ferð, sigur Niklas á Líðarenda.

Kanska hevði kjansurin hjá Pól eisini verið størri, stillaði hann í staðin upp til nevndarvalið, tí so hevði hann verið ein av trimum, ið stóð fyri vali. Har vóru nú bara tveir í uppskoti, Niclas Davidsen og Karl Vidtfeldt, sum tí báðir vóru afturvaldir.

# Rættindi geva minst 64 milliónir í kassan

**Inntøkurnar frá sjónvarpsrættindum og bandalýsingum í sambandi við landsdystir verða næstan seksfaldaðar næstu árini. Nýggi sáttmálin við sveisisku fyritøkuna Kentaro gevur Fótbóltssambandinum í minsta lagi 64 milliónir krónur fram til 2014**

FSF-AÐALFUNDUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Eftir tingingar í eitt ár er eydnast Fótbóltssambandinum í november mánaði at fáa nýggjan sáttmála um sjónvarpsrættindi og bandalýsingar undir land. Og avtalan við sveisisku fyritøkuna Kentaro er so mikið góð, at Fótbóltssambandið skorar í minsta lagi 64 milliónir krónur fram til 2014. Tað er næstan seks ferðir so nógv, sum fekst burtur úr gamla sáttmálanum.

– Hetta eru nógvir pengar, men teir eru einki verdir, fyrr enn teir koma føroyskum fótbólti til gagns, segði FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu, á aðalfundinum leygardagin, tá hann eisini fegnaðist um hjálp, Fótbóltssambandið hevur fingið frá UEFA í sambandi við tingingarnar.

Fleiri vóru um boðið, nú rættindini fyri EM- og HM-undankappingar og vinardystir hjá føroyska A-landsliðnum og U21-landsliðnum fram til 2014 skuldu fáast upp á pláss. Men við góðum hegni og kanska ikki sørt av hepni, nú fíggjarkreppan síðani undirskrivingina hevur broytt so nógv, er talan um eina søguliga stóra avtalu.

Kentaro vann kappingina um føroyska landsliðsfótbóltin við IMG, UFA-Sport og Sportfive, sum hevur havt rættindini um hendi síðani 1993.

Kentaro hevur ábyrgd av og rindar fyri, at dystirnir verða upptiknir, meðan Fótbóltssambandið rættin til alla sjónvarping í Føroyum, umframt 24 metrar av lýsingarplássi til allar heimadystir. Eitt nú gera hesir metrarnir, at nýggi sáttmálin er verdur »í minsta lagi« 64 milliónir krónur.